LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøters gøta 7
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

Tórshavn, tann 30. oktober 2024
J.Nr.: LUM-16- 24/15211-60
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðv. klaguni frá A, dagfest 12. juni 2024**

Eg havi kunnað meg um klaguna frá A, dagfest 12. juni 2024.

Klagað verður um, at sonur klagarans, ið hevur infantila autismu, og ikki kann verða einsamallur, ikki sleppur í frítíðarskúla, tá skúlarnir hava frí. Hetta hevur við sær, at klagarin noyðist at vera heima frá arbeiði og ansa honum. Klagarin greiðir víðari frá, at støðan m.a. førir við sær stúran og inntøkumiss fyri familjuna, umframt at tað hevur avleiðingar fyri persónligu menningina hjá soninum.

Klagan er eitt framhald av klagu, dagfest 1. februar 2023, ið førdi við sær, at eg at tók mál upp av egnum ávum við Barna- og útbúgvingarmálaráðið um nágreining av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini (løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt) har ásett er, at dagstovnar og dagrøktir hava opið gerandisdagar í dagtímunum.

Eftirfylgjandi sendi eg skriv til Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfest 23. august 2023 (LUM 23/05988).

Í skrivinum endurgav eg Barna- og útbúgvingarmálaráðið fyri at greiða soleiðis frá um teirra fatan av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini viðvíkjandi frítíðarskúlum / heimum:

> "Yvirskipað kann sigast, at orsøkin til at frítíðarheim kunnu hava stongt, tá ið skúlarnir eru í feriu, skal síggjast í ljósinum av, at talan er um eitt tilboð til børn, sum ganga í forskúla og til og við 3. flokk, har tey hava møguleika fyri at koma í frítíðarheim eftir skúlatíð, sum vanliga er frá umleið kl. 12.00, tá ið skúlatíðin hjá hesum flokkum er liðug, og til umleið kl. 17.30. Talan er sostatt um eitt tilboð, sum á ein heilt serligan hátt er tengt at skúlanum og skúlagongdini, og tískil verður lagt til grund, at upplating av hesum tilboði eisini eigur at fylgja skúlatíð og upplating.
>
> Viðvíkjandi frítíðarheimum so er hetta sum áður víst á, tengt at skúlavirksemi, og kemur sostatt eisini framyvir at verða tengt at hesum. Væntast kann tískil ikki, at vanliga tilboðið um ansing eftir skúlatíð, tá skúlin hevur stongt, verður ásett í komandi dagføring av dagstovnalógini. Tó er og vil tað altíð vera soleiðis, at har hetta tilboð verður bjóðað út, skal tað eisini kunna veitast teimum børnum, sum eru fevnd av § 5, stk. 1, vísandi til meginregluna um líkskap."

Í skrivinum gjørdi eg Barna- og útbúgvingarmálaráðnum soljóðandi greitt:

> "...tá ið frítíðarheim av lóggávuvaldinum eru sett inn í dagstovnalógina, mugu tey metast at vera umfatað av § 3, stk. 2 um, hvussu dagstovnar hava opið, uttan so at serligar ásetingar ella undantøk eru gjørd viðvíkjandi teirra upplatingartíðum.

> Um so er, at ásetingin um at hava opið gerandisdagar einans skal umfata skúladagar í mun til frítíðarheim, átti tað at verið ásett greiðari í lógini, at frítíðarheim er nærri tengt at fólkaskúlanum og frídøgunum har. Lógarviðmerkingarnar nevna einki um tað.
>
> Eg eri sostatt ikki samd við Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í tulkingini av orðingini "gerandisdagar" í § 3, stk. 2 í dagstovnalógini, tá tað snýr seg um, nær frítíðarheim o.a. vanliga hava opið"

Vísandi til, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið í skrivi, dagfest 24. apríl 2023, hevði kunnað meg um, at dagstovnalógin skuldi dagførast í næstum, gjørdi eg ikki meira við málið tá.

Nú hevur klagarin aftur vent sær til umboðsmannin í juni 2024 og víst á, at trupulleikin við ansing enn stendur óloystur.

Í frágreiðing, dagfest 9. juli 2024, og í telduposti, dagfestur 4. september 2024, boðaði Barna- og útbúgvingarmálaráðið mær frá, at farið nú er í gongd við at endurskoða lóggávuna, og at dagstovnalógin, m.a. nágreining og broyting av § 3, stk. 1 og 2, væntandi verður lagt fram í mars mánaða 2025.

Tann 9. oktober 2024 setti eg Barna- og útbúgvingarmálaráðnum soljóðandi fyrispurning í sambandi við eitt skriv, ið ráðið hevði sent MEGD:

> "...
> Í skrivi til MEGD, dagfest 20. desember 2023, greiðir ráðið soleiðis frá:
>
> > "...
> > Harumframt er ætlanin, at frítíðarskúlar ikki skulu fylgja skúlunum og teirra frídøgum og frítíðum, men høvi skal verða fyri ansing, tá skúlarnir hava frí.
> > ..."
>
> - Verður í løtuni arbeitt við at frítíðarskúlar skulu hava opið sum dagstovnar og ikki fylgja skúlafrítíðini – er hettar partur av arbeiðinum at endurskoða dagstovnalógina?
>
> - Vísandi til ósemjuna um tulking av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini, hevur ráðið broytt støðu, ella heldur ráðið seg til sína tulking av § 3, stk. 2, ið fráboða umboðsmanninum í frágreiðing, dagfest 24. apríl 2023?, tykkara máls.nr.: 21/16717-11

Tann 14. oktober 2024 svaraði Barna- og útbúgvingarmálaráðið soleiðis:

> "...
> ***Viðv. sp. 1***: Ein arbeiðsbólkur er settur at skriva álit til dagføring av dagstovnalógini. Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum er at koma við ítøkiligum uppskotum til hvørjar dagføringar skulu gerast í dagstovnalógini, soleiðis at dagstovnalógin betur avspeglar tann tørv sum nútíðarsamfelagið hevur við atlit til dagstovnaøki. Arbeiðsbólkurin skal m.a.:
>
> - Lýsa lógarinnar endamál og øki, og gera tilmæli um møguligar broytingar, soleiðis at tað gerst meir greitt hvat uppgávan hjá dagstovnunum er og hvør er fevndur av lógini.
> - Lýsa uppgávur og uppgávubýti millum ávikavist land og kommunu, og gera tilmæli um møguligar broytingar hesum viðvíkjandi, soleiðis at hetta gerst meir greitt, og barnið og familjan uppliva eitt samanhangandi tilboð.
> - Lýsa og gera tilmæli viðvíkjandi starvsfólkasamansetningi, harundir gera tilmæli um møguliga minimumsnormering.

> ***Viðv. sp. 2.*** : Viðkomandi partar vera tiknir við í gongdina og miðja verður ímóti, at álitið, verður handað landsstýrismanninum í BUMR, um miðjan januar 2025.
> Ásannandi at talan er um eitt økið, sum kommunurnar umsita, og sum liggur innan eitt ávíst kommunalt frælsi, ber tó ikki til at siga við vissu, hvussu ein møgulig ansing, tá skúlarnir hava frí, kann skipast."

Av tí at eg ikki metti meg hava fingið svar uppá spurningin um tulkingini av § 3, stk. 2 í dagstovnalógini, spurdi eg ráðið, um tað var rætt skilt, at ráðið ikki er samt við mær í síni tulking av § 3, stk. 2, men at ráðið fór at arbeiða við hesum viðurskiftum í komandi álitinum í sambandi við dagføring av dagstovnalógini. Barna- og útbúgvingarmálaráðið svaraði hesum játtandi í svari, dagfest tann 17. oktober 2024.

At arbeiði við at endurskoða dagstovnalógina ikki er komið longri, haldi eg vera harmiligt.
Her hugsi eg serliga um, at tað fyri ávísar borgarar, harímillum klagaran, hevur alstóran týdning at kenna úrslitið av endurskoðanini av dagstovnalógini, og hvør teirra støða verður í komandi skúlafrítíðum.

Hóast eg harmist um málsviðgerðartíðina, so kann eg staðfesta, grundað á svarið frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, dagfest 14. oktober 2024, at ráðið og eg, eftir øllum at døma, ikki eru samd um, hvussu § 3, stk. 2 í dagstovnalógini eigur at tulkast. Grundað á svarið frá ráðnum, dagfest 14. oktober 2024, haldi eg tað ikki vera heilt greitt, hvussu viðurskiftini kring ansing fara at verða skipaði í komandi dagføringini av dagstovnalógini. Eg gevi mær tó far um, at ætlanin sambært ráðnum er, at børn og familjur teirra skulu uppliva eitt meiri samanhangandi tilboð.

Hóast eg ikki eri samd við háttin, ið Barna– og útbúgvingarmálaráðið tulkar § 3, stk. 2 í dagstovnalógini, so meti eg meg ikki heilt kunna vísa burtur tulkingina hjá ráðnum, sum í ávísan mun kann metast at samsvara við ta virkisfrælsi, sum, sambært dagstovnalógini, er lagt til kommunurnar at skipa økið.

Tó at eg skilji truplu støðuna hjá klagaranum, haldi eg meg, vísandi til omanfyristandandi, ikki kunna átala ráðið fyri nýttu málsviðgerðartíðina.

Klagarin hevur víst á ymiskar ásetingar í Barnarættindasáttmálanum og spurt, um ikki vantandi tilboðið um frítíðarskúla er brot á Barnarættindasáttmálan.

Barnarættindasáttmálin ásetir grundleggjandi rættindi hjá børnum, tað eru borgaralig-, politisk-, fíggjarlig-, sosial- og mentanarlig rættindi.

Føroyar hava samtykt at fylgja Barnarættindasáttmálanum og tískil bundið seg til at fylgja ávísum reglum um barnarættindi.

Hendan binding merkir, at Føroyar skulu evna sína lóggávu, sín politikk og sínar mannagongdir soleiðis, at hesar samsvara við tær meginreglur, ið eru ásettar í sáttmálanum. Tað er upp til hvørt einkult land at leggja støðið. Fimta hvørt ár verður ein eftirmeting framd av ST, har Føroyar skulu vísa á, at støðið, ið er lagt, samsvarar við sáttmálan. Á henda hátt er eitt ávíst rásarúm hjá myndugleikunum at seta í verk skipanir, ið eru mettar neyðugar til tess at halda meginreglurnar í Barnarættindasáttmálanum.

Skipanin við frítíðarskúlum er ásett við løgtingslóg, har støða ítøkiliga er tikin av Føroya Løgtingið til, at kommunur kunnu velja at hava tilboð ella ikki. Hetta letur upp fyri at tænastustøðið og tilboðini til børn kunnu vera sera ymisk kring landið. Givið er, at hetta á ein serligan hátt rakar familjur við børnum við serligum tørvi, sum ikki hava sama møguleika at lata børnini vera sjálvi.

Eg haldi meg ikki kunna siga, at sjálv lógin er í stríð við Barnarættindasáttmálan, men vil vísa á at umsitingin av henni, sambært tulkingini hjá ráðnum, lættliga kann føra við sær mismun og avbjóðandi umstøður fyri børn við serligum tørvi.

Í fráboðan frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, dagfest 15. oktober 2024, verður m.a greitt frá, at arbeiðsbólkur er settur at skriva álit við atliti at dagføra dagstovnalógina, og at "Neyðugt er at tryggja, at lóggávan speglar verandi samfelagsviðurskifti og stuðlar undir barnsins menning og tørv hjá nútíðar familjuni...". Við hesum í huga haldi eg tað vera sjálvsagt, at arbeiðið hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum at endurskoða dagstovnalógina, serliga § 3, stk. 1 og 2, tekur støði í Barnarættindasáttmálanum (Bekendtgørelse nr. 6 af 16. januar 1992 om FN-konvention af 20. november 1989 om Barnets Rettigheder).

Tvær av høvuðsreglunum í Barnarættindasáttmálanum eru grein 3 og grein 12:

- Grein 3: at vaksin skulu gera tað, sum er best fyri børn (eftir hetta nevnt, barnsins besta)
- Grein 12: at børn hava rætt til at hava sína egnu meining, og hana skulu tey vaksnu virða (eftir hetta nevnt, barnsins sjónarmið)

Verandi dagstovnalóg, løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai. 2000, sæst ikki at viðgera Barnarættindasáttmálan, undir hesum greinarnar 3 og 12, hvørki í almennu ella serligu viðmerkingunum til lógina.

Grein 3 hevur sum endamál at tryggja áhugamálini hjá børnum. Greinin hevur við sær, at barnsins tørvur skal setast fremst í øllum tiltøkum viðvíkjandi børnum. Hetta merkir, at í sambandi við lóggávuarbeiðið, ið fevnir um viðurskifti hjá børnum, eigur støðutakan til tørv og umstøður at endurspeglast í endaliga úrslitinum av hesum arbeiði.

Fyri at kunna taka atlit at barnsins besta í lóggávuarbeiðinum, er neyðugt, at ráðið í hvørjum einstøkum føri kannar og upplýsir lógarmálið við tí fyri at eyga at lýsa, hvat hetta ítøkiliga hevur við sær fyri tey børn, sum verða ávirkað av lógini. Lýsingin eigur eftir míni meting at fevna um, hvørjar avleiðingar lóggávan kann væntast at fáa fyri børn, bæði sum einstaklingar og sum bólkur, eins og hvussu umfatandi hesar avleiðingar kunnu væntast at verða.

Grein 12 hevur sum endamál at tryggja, at børn hava rætt til at hava sína egnu meining, og tey vaksnu skulu virða hana. Greinin merkir, at børn, sum eru før fyri orða síni egnu sjónarmið, hava rætt til frítt at sleppa at greiða frá sínum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið.

Ein lýsing av barnsins besta (grein 3) og barnsins sjónarmiði (grein 12) má, vísandi til Barnarættindasáttmálan, metast at vera ein sjálvsagdur og týdningarmikil liður í lóggávuarbeiðinum hjá ráðnum, nú lógin verður endurskoðað og støða skal takast til, hvørji tilboð skulu veitast. Um hesi viðurskifti ikki verða nøktandi lýst, er vandi fyri, at atlitið til barnið ikki

verður tikið við millum onnur lóglig og kravd atlit, og at atlitið ikki fær ta tyngd, sum tað eigur at hava, í sambandi við áseting av rættindum og skyldum í lóggávu viðvíkjandi børnum.

Ein háttur hjá ráðnum at lýsa lóggávumálið samsvarandi grein 3 og grein 12 kundi verið at hoyrt teir áhugabólkar, ið varða av áhugamálunum hjá teimum børnum, ið lóggávan skipar.

Eg fari staðiliga at mæla til, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur Barnarættindasáttmálan, og undir hesum greinarnar 3 og 12, í huga í sambandi við arbeiðið at endurskoða dagstovnalógina og ætlanina at nágreina og broyta § 3 í lógini. Hetta so at komandi dagføringin av dagstovnalógini á neyðugan hátt lýsir og tekur støði í bestu loysn fyri Føroya børn, og at henda loysn slóðar fyri, at tað ikki er tilvildarligt, hvørja tænastu børnini fáa, og á hvørjum støði hon verður veitt, í mun til hvar í landinum tey búgva.

Vinarliga

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður